# Skuldsettur fyri svik fyri milliónir

**SVIK** Politiið í Horsen er nú komið undir land við kanningunum av leiklutinum hjá Jan Allani Müller í sambandi við Injector Trawldoors í Horsen. Hann er nú skuldsettur fyri svik fyri milliónir



*Jan Allan Müller*

Eirikur LIndenskov

Fyrrverandi stjórin í Injector Trawldoors, Jan Allan Müller, er nú skuldsettur fyri bedragarí í milliónaklassanum. Skuldsetingin kemur nú – eitt ár eftir, at leiðslan í felagnum meldaði málið til løgregluna.

– Orsøkin til, at málið hevur tikið so langa tíð er, at málið er sera fløkt, sigur Torben Svarer, politikommiserur í Sydøstjyllands Politi, sum tó ikki vil vátta, at talan er um Jan Allan Müller.

Men hann sigur, at 41 ára gamli maðurin enn ikki hevur tikið støðu til skuldsetingar, men Horsens Folkeblad skrivar, at maðurin kann rokna við ákæru um fíggjarundandrátt og skatta- og mandatsvik fyri fleiri milliónir krónur.

Injector Trawldoors, sum fór á heysin í september í fjør, gjørdi útgerð til fiskiídnaðin, og tað vóru fyrrverandi eigararnir av virkinum, sum varnaðust, at stjórin eftir øllum at døma svindlaði við felagsins pengum. Síðani kom løgreglan upp í málið.

Alt ljóðaði annars so væl, tá Jan Allan Müller og onnur stovnaðu fyritøkuna Injektor Trawldoors í Horsen í Danmark, og TF Holding hevði álit á fyritøkuni.

– Endamálið hjá okkum er eisini at stuðla upp undir føroyskar fyritøkur, og vit mettu, at trollemmarnir vóru ein tann besta uppfinningin, sum nakrantíð er gjørd. Tí settu vit pening í felagið, segði Gunnar í Liða, táverandi stjóri í TF Holdeing við Sosialin í oktober í fjør.

Hann segði eisini, at tað er trupult at tryggja seg ímóti óreglusemi.

Tryggingarfelagið keypti seg gjøgnum eitt annað felag inn í fyritøkuna og hevur síðani havt umboð í nevndini.

Gunnar í Liða visti tá ikki nágreiniliga, hvussu nógvan pening Tryggingarfelagið hevur mist, men talan er um fleiri milliónir krónur.

Hann segði, at talan er um eitt sera óheppið mál. Nevndin hevði illgruna um, at fyritøkan fór av knóranum vegna óreglusemi.

– Vit og leiðslan í Danmark meldaðu málið til politiið, tí vit høvdu sterkan illgruna um óreglusemi. Vit vilja hava alt kannað, og er óreglusemi farið fram, má tað fáa avleiðingar. Hvør steinur skal vendast, segði Gunnar í Liða.

Politiið í Horsens hevur arbeitt við málinum, síðani tað varð meldað, og nú er kanningararbeiðið komið so langt, at stjórin verður skuldsettur, váttar Torben Svarer, politikommisserur.

eirikur@sosialurin.fo

## KÍ misti pengar

Av teimum nógvu kreditorunum hjá Injector Trawldoors er Klaksvíkar Ítróttarfelag ein. Teirra missur er sponsorpeningur fyri í hvussu er eitt ár.

Fyrráríð gjørdi KÍ sáttmála við Injector Trawldoor um at sponsorera, og tá fekk fótbóltsvøllurin í Klaksvík navnið Injector Arena.

Men tað gekk illa at fáa peningin frá Injector Trawldoors, og tá ið Injector Trawldoors endaði í fútarættinum síðsta summar, gavst KÍ at rykkja eftir peninginum.

Nevndin helt tá, at frægast var at gevast við at rykkja eftir pengunum og heldur brúka pengarnar til annað virksemi.

Sáttmálin segði annars, at KÍ skuldi hava 120.000 krónur um árið. Í fjør fekk felagið ikki eitt oyra, so kravið til trotabúgvið var í minsta lagið tað.

Vøllurin fekk síðani aftur navnið vøllurin á Djúpumýri.